LM-117/2023

Fylgiskjal 5

Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Tórshavn, 19 april 2024

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um tøkugjald

Víst verður til ráðstevnuna um tilfeingisgjøld, sum Búskaparráðið skipaði fyri í mars 2023 í Løkshøll. Ætlanin við ráðstevnuni var at varpa búskaparfakligt ljós á skipanir, ið uppkrevja tilfeingisrentu til felagskassan í Føroyum, bæði tá tað kemur til tilfeingisgjøld frá fiskivinnuni og tøkugjøld frá alivinnuni. Umboð úr Noregi og Íslandi greiddu frá ymiskum skipanum og komu við fakligum boðum uppá, hvussu skipanir kunnu setast saman. Umframt framløgur frá serfrøðingum var eisini eitt ávíst kjak, har fyrimunir og vansar við ymisku skipanunum vórðu lýstar, hartil komu nøkur boð uppá, hvussu skipanirnar kunna betrast. Yvirskipaða endamálið við tiltakinum var samfelagsbúskaparligur effektivitetur og varandi burðardyggur vøkstur í búskapinum.

Av tí at stórur partur av yvirskotunum í alivinnuni stava frá framíhjárættindum at nýta náttúrutilfeingi, ynskja almennir myndugleikar í Føroyum og Noregi at taka ein part av yvirskotinum inn aftur sum gjald fyri framíhjárættin. Uppskotið til løgtingslóg um tøkugjald er eitt boð upp á, hvat samgongan saman við Sambandsflokkinum metir vera ein rímiligan part av yvirskotinum, og hvussu gjaldið skal uppkrevjast.

Ein av orsøkunum til, at samgongan longu nú hevur valt at endurskoða skipanina við tøkugjøldum, sum bleiv løgd fram og samtykt fyri einum ári síðani, er, at tann skipanin segðist ávirka atferðina hjá alifyritøkunum ov nógv.

Heilt ítøkiliga gjørdi høga progressiónin í tøkugjaldinum tað nógv meira óvist, um portiónsframleiðsla – sum kravdi sølusáttmálar fram í tíð – fór at løna seg eftir skatt. Hetta tí støddin á tøkugjaldinum verður ásett við støði í aktuella spottprísinum, meðan portiónirnar eru seldar upp á sáttmálaprísir, vanliga eitt ár fram. Hendan økta óvissan í skipanini elvdi til, at størsta føroyska alifyritøkan valdi at minka munandi um sítt virksemi við meirvirking og framdi uppsagnir. Eisini gjørdu alifyritøkur vart við, at tøkugjaldsskipanin og serliga høga progressiónin fór at minka um áhugan í at gagnnýta og menna aliøkir við lægri vinningi.

Landsbanki Føroya · Kvíggjartún 1 · Box 229 · FO-165 Argir

Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

Bakgrundin fyri góðu úrslitini í føroyskari alivinnu

Serfrøðingur frá norskari greiningarfyritøku greiddi á ráðstevnuni í fjør frá bakgrundini fyri støðuni í føroysku alivinnuni nú. Føroyska alivinnan er vaksin nógv síðstu árini, og føroyska alivinnan er í serflokki. Umhvørvisligu fortreytirnar at ala eru góðar í Føroyum, og harafturat settu almennu myndugleikarnir í Føroyum eftir kreppuna í alivinnuni fyrst í 00'um strangar veterinerar reglur í verk. Hetta, saman við dugnaligum alaranum og stórum íløgum hjá føroysku vinnuni, hevur fingið alivinnuna at blóma.

Eisini hevur altjóða alivinnan blómað sum heild, tá útboðið ikki hevur megnað at fylgt við vaksandi eftirspurninginum. Føroysku alifyritøkurnar hava síðstu árini gjørt lutfalsliga størri íløgur í millum annað smoltstøðir, og merkir hetta, at laksurin gongur styttri í sjónum. Hetta er við til at minka um lívfrøðiligu avbjóðingarnar sum til dømis laksalús og sjúku. Alt hetta samlað ger at kiloprísurin fyri heilan føroyskan alilaks er tann hægsti í heiminum, áleið eina evru hægri enn fyri heilan norskan alilaks.

Eisini bleiv víst á, at neyðugt er framhaldandi við stórum íløgum fyri at hava tamarhald á sjúku og laksalús, fyri ikki at tosa um framhaldandi vøkstur í tøkunøgdum. Hartil skal havast í huga, at krøv frá umhvørvisfelagsskapum viðføra enn størri íløgutørv í framtíðini.

Yvirskipaðu búskaparfakligu ynskini til skatting av tilfeingisrentu

Umráðandi er at seta saman avgjaldsskipanir, soleiðis at hesar ikki ávirka annars skilagóðar fíggjarligar avgerðir, ella beinleiðis eru viðvirkandi til suboptimering. Somuleiðis er umráðandi, at avgjaldsskipanin ikki førir til lægri íløgur, tí hetta hevur neiliga ávirkan á búskapin frameftir. Út frá hesum fyritreytum var eitt av tilmælunum, at taka tilfeingisgjaldið á alivinnuna inn umvegis partafelagsskattin, við at hava ein hægri partafelagsskatt á alivinnuni. Mett verður, at slík skipan hevur minst skeiklandi ávirkan á atburðin hjá alivinnuni, samstundis sum gjald verður tikið inn fyri framíhjárættindi. Hetta vísti eitt nú Helene Ultveit-Moe, professari í búskaparfrøði, á í síni framløgu á ráðstevnuni.

Strika tøkugjald og skatta heldur bert sjógvalingina

Í nýggja uppskotinum til tøkugjaldskipan er ætlanin at samanseta ein aliskatt (eyka partafelagsskatt á 8%) við eina tøkugjaldsskipan. Sostatt verður hildið fast um skipanina við tøkugjøldum. Hetta mælir Búskaparráðið frá við støði í boðskapunum frá ráðstevnuni í mars 2023. Heldur áttu føroysku myndugleikarnir at tikið stigið fult út og strikað skipanina við tøkugjøldum og fari heilt yvir til eina skipan við eykaskatti á yvirskotið í sjógvalingini.

At eykaskatturin einans skal fevna um sjógvalingina er eyðsýnt, tá framíhjárættindi eru knýtt at gagnnýtslu av firðunum. Alivinnan hevur við milliarda stórum íløgum í stórar smoltstøðir

Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

og atknýttar íløgur økt um smoltstøddirnar við útsetu, soleiðis at tíðin í sjónum gerst styttri. Hetta hevur økt munandi um alikapasitetin í firðunum, tá tíðin í sjónum er farin frá 18 til 12 mánaðir, sum aftur økir munandi um inntøkurnar frá sjógvalingini og harvið skattagrundarlagið. At hetta smoltvirksemi nú eisini verður skattað við nýggja aliskattinum er í stríð við sjálva meginregluna fyri at skatta framíhjárættindi og ger seg inn á insitamentini hjá vinnuni framhaldandi at menna vakstrarmøguleikarnar við smoltaling, sum ikki er treytað av framíhjárættindunum.

Skattaskipanir ávirka kappingarførið hjá útflutningsvinnum. Við fullkomiliga flytførum kapitali umvegis altjóða íløgur eigur hædd eisini at vera tikin fyri hesum. Í hesum føri hava norskir myndugleikar nýliga gjørt eina nýggja skipan til skatting av framíhjárættindunum hjá norsku alivinnuni til at gagnnýta teirra alifirðir. Norska alivinnan er sum kunnugt marknaðarleiðandi á altjóða marknaðinum fyri alilaks, harvið eru karmarnir hjá kappingarneytunum hjá føroysku alifyritøkunum lagdir í fleiri ár fram.

Norska skipanin byggir á meginreglurnar, sum Ultveit-Moe professari skjeyt upp í frágreiðing gjørda yr inorska tingið. Somu meginreglur, sum Ultveit-Moe bar fram á ráðstevnuni í Løkshøll í mars í fjør. Tá ávaraði professarin eisini staðiliga ímóti eini skipan sum tí føroysku við tøkugjaldi, sum verður álagt á umsetningin, óansæð um alifyritøkurnar hava vinning ella ei. Tí hetta skeiklar íløguavgerðirnar hjá alifyritøkunum, sum tá velja íløgur frá vegna høga skattin, tá vinningurin væntast at vera lítil.

Umframt hesa skeiklan elvir tøkugjaldsskipanin eisini framvegis til, at alifyritøkurnar verða eggjaðar frá at framleiða til portiónir, tá tøkugjaldið er tengt at spottprísinum sambært "Fish Pool Index". Hetta er prísurin fyri kruvdan laks av bestu góðsku í Norra. Hóast progressiónin í tøkugjaldinum nú er minkað, so er tað framvegis soleiðis, at tað skeiklar til fyrimuns fyri heilan laks í mun til meirvirkaðan laks. Eisini tí at portiónsframleiðslan í Føroyum kappast við norska portiónsframleiðslu, har norski aliskatturin er grundaður á veruliga søluprísin og veruliga framleiðslukostnaðin, meðan tað í Føroyum er bæði ein 'fiktivur' marknaðurprísur (á besta kvalitetslaksinum í Norra) og ein 'fiktivur' framleiðslukostnaður útroknaður við støði í framleiðslukostnaðinum hjá teimum trimum føroysku alarunum.

Ein av høvuðsorsøkunum til endurskoðanina av tøkugjaldsskipanini var atlitið til meirvirking í Føroyum. Men tíverri broytir nýggja skipanin ikki stórvegis upp á hesa skeiklanina og tí kann ikki roknast við, at slíkt virksemi við meirvirking fer at økjast aftur við nýggju skipanini.

Føroysku myndugleikarnir áttu heldur at gjørt eina skipan, sum neyvt líkist tí norsku aliskattaskipanini, sum í nógv minni mun skeiklar atferðina hjá alifyritøkunum og samstundis eggjar til víðari menning av alivinnuni komandi áratíggjuni. Við at leggja seg tætt upp at tí norsku skipanini, tryggja føroyskir myndugleikar eisini, at kappingarførið hjá føroysku alivinnuni í mun til marknaðarleiðaran verður varðveitt.

Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

Bæði upp á stutt sikt og serliga upp á langt sikt verður mett, at ein aliskattaskipan vil geva felagskassunum ein munandi størri part av tilfeingisrentuni enn blandingsskipanin í hesum uppskotinum.

Skynsamt við breiðum politiskum semjum, sum røkka yvir fleiri valskeið

Óansæð val av skipan er tað umráðandi, at vinnan sum heild hevur støðugar karmar og veit, hvat vinnan hevur í væntu. Hetta ger seg serliga galdandi í kapitalintensivum vinnum sum fiskivinnu og alivinnu, har lutfalsliga stórur partur av virðisøkingini skyldast íløgum í framkomna tøkni og maskinur. Ein vinna við óstøðugum kørmum kastar ikki nóg nógv av sær, tí hon fremur ikki neyðugu íløgurnar við framtíðini í huga.
Tí er tað eisini skynsamt, at samgongan í hesum føri hevur megnað at gjørt eina breiða politiska semju við Sambandsflokkin.

LANDSBANKANEVNDIN, Tórshavn 19. apríl 2024